**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing

## Varaskúlastjórastarv í Vestmanna skúla

**Starvið sum varaskúlastjóri í Vestmanna skúla verður lýst til setanar frá <u>1. august 2004.</u>**

**Vestmanna skúli hevur 202 næmingar í 1. - 10. fl. 22 lærarar starvast í skúlanum.**

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi I við fyribils tænastu í Vestmanna skúla. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. mai 2004.

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**Tórshavn 6. mai 2004**

**Mentamálaráðið - Hoyvíksvegur 72**
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

# Kontorelev til Rigsombudet

Rigsombudet søger en kontorelev indenfor området »Offentlig forvaltning – Stat«. Stillingen ønskes besat 1. september i år eller efter nærmere aftale.

**Vi forventer**
- at du har HH-eksamen, eller har studentereksamen eller HF suppleret med Handelsskolernes 18 ugers kursusforløb
- at du er god til at formulere dig mundtligt og skriftligt, på såvel færøsk som dansk
- at du er selvstændig, initiativrig og har gode samarbejdsevner
- at du har godt kendskab til EDB

**Vi tilbyder**
- en 2-årig uddannelse inden for kontorfaget
- en god og kvalificeret elevplads med et veltilrettelagt uddannelsesforløb der berører alle Rigsombudets kontorfunktioner
- mulighed for deltagelse i den egentlige sagsbehandling på det familieretlige område
- løn efter overenskomst mellem Finansministeriet og HK-forbundet i Danmark

Elevtiden omfatter i alt 15 ugers skoleophold i Danmark. Rejse og ophold betales af Rigsombudet.

Du kan få yderligere oplysninger om stillingen ved at henvende dig til fuldmægtig Dan M. Knudsen eller kontorfuldmægtig Anna Weihe på telefon 35 12 00 mellem kl. 10 og 14.

Skriftlig ansøgning med kopi af eksamenspapirer m.v. sendes til Rigsombudet, Postboks 12, 110 Tórshavn. Ansøgningsfristen er mandag den 5. juli 2004.

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

**Birgit Kleis**


Designskolen
Nykßbing F



Kursusstart
1. august 2004:

Hßjskoleophold
med liniefag: Graýk,
billedkunst, tekstil
samt valgfag

10. kl. med dansk,
matematik og engelsk
i kombination med
et designfag: Graýk,
billedkunst eller tekstil

Skolen for tekstil Â billedkunst Â graýk
Neckelmannsgade 5 Â 4800 Nykßbing F Â Tlf. 5486 0553
www.designskolen.dk Â email info@designskolen.dk

GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

lær at mála
»NATURALISTISKT«
VIKUSKIFTIÐ
4.-6. JUNI
TEL 31 47 66
ARNGERÐ LAMONT




# Hjálparfólk

## til frítíðarskúlan Smílibýlið í Stoffalág 82

**Størvini:**
Eru eitt hjálparstarv uppá 25 t. og eitt fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi uppá 25. t.

**Stovnslýsing:**
Á Frítíðarskúlanum Smílibýlinum ganga 64 børn. 42 ganga fyrrapart og 22 ganga seinrapart.

**Tað er týdningarmikið:**
At tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum, og eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

**Vit leggja stóran dent á:**
At vit eru eitt frítíðartilboð til børnini. Vit eru saman við børnunum í teirra frítíð.
Vit vilja skapa møguleika fyri, at børnini mennast við at lurta, práta og og vera saman við teimum.

**Setanarviðurskifti:**
Størvini verða sett tann 09. august 2004, løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgerarafelag og Føroya Pedagogfelag.

**Umsókn:**
Saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi í seinast 14. juni 2004.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Frítíðarskúlan Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn.
Setanarsamrøður verða skjótast gjørligt eftir hetta.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til:
Barbaru Dahl, leiðara og
Bjørg Danielsen, varðaleiðara á Tlf. 314879

## Til sølu

Ein Iveco lastbilur við alminiumskassa og lift, árg. 95 til sølu.

**Tlf. 218811**


TÍN ÚTBÚGVING TÍN FRAMTÍÐ



*Nýggjur útbúgvingarmøguleiki*

FHS sum fjarlestur

| | |
|---|---|
| ⊄ útbúgving: | FHS-stakgreinir sum fjarlestur<br>Møguleiki fyri FHS-prógvi uppá 2 ár |
| ⊄ upptøkutreytir: | nøktandi 9./10. floks prógv |
| ⊄ umsóknarfreist: | 4. juni |

Hevur tú spurningar í sambandi við útbúgvingina, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skúlan á 444 900 ella fh@kambsdal.olivant.fo.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til skúlan. Eisini er nærri kunning og umsóknarblað at finna á www.fh.fo.

⊄ Kambsdalur
⊄ 444 900
⊄ fh@kambsdal.olivant.fo
⊄ www.fh.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI

WildStar 1600 cc til sølu



Stórur crusari til góðar túrar, hevur nógv eyka krom, summar klár.
**Til sølu um hóskandi boð fæst.**
Onnur súkkla kann møguliga innganga í handilin. Myndir kunna sendast við e-mail, send mær ein mail á: **carl@oilwind.fo**
**Vinarliga ring 221122**
Sosialurin 341800

Innbjóðing
Í sambandi við, at Serstovnadeildin tekur í brúk eitt nýtt Verkhús og døgnumlætting í Sørvági, verður bjóðað
til Móttøku
á Verkhúsinum í Sørvági,
týsdagin tann 1. juni 2004 frá kl. 15-17.
Tað hevði gleðt okkum at sæð øll, sum hava samband við tilboðini hjá Serstovnadeildini í oynni, hendan dagin.
Hovið verður at síggja húsið og heilsa uppá leiðsluna og starvsfólkini á staðnum. Eisini verða umboð fyri Sørvágs kommunu til staðar.
Serstovnadeildin
Telefon 304020